*Olaf Olsen, nevndarlimur í Føroya Kolvetni:*

# Umhugsa at skifta Cubatrolarararnar út

*- við nýggjari skip og brúka gomlu cubabátarnar í oljuvinnuni*



*Kubatrolararnir hava tænt fyri sítt breyð*

JAN MÜLLER
STAVANGER

Millum teir gomlu og royndu føroysku vinnulívsmenninar, sum eru við á oljumessuni í Stavanger í hesum døgum er eingin minni enn „the grand old man“ í føroyskari fiskivinnu og fyrrv. landsstýrismaðurin Olaf Olsen.

Vanliga seta vit navnið Olaf Olsen í samband við fiskivinnu og reiðskap til fiskivinnuna. Men kortini var júst Olaf Olsen ein av teimum fyrstu vinnulívsmonnunum, sum vísti eini komandi oljuvinnu ans. Hetta var fyrst í 90-unum, tá hann og aðrir stovnaðu oljufelagið „Kolan“, ið hevði til endamál at savna vitan um olju og fáa samband við teir, sum vóru í oljuvinnuni, at fáa føroyingar at virka í hesi vinnu. Tað kom tó ongantíð verulig gongd í felagið, sum kortini framvegis er tiil.

Nú er Olaf Olsen tó aftur at síggja millum teir føroyingar, ið vilja vera við í oljuvinnuni. Hann er nevndarlimur í oljufelagnum Føroya Kolvetni, sum hevur fingið leitiloyvi saman við italska felagnum Agip.

-Eg rokni við, at oljan fer at verða ein stórur partur av føroyska vinnulívinum og sum vinnulívsmaður haldi eg tað vera spennandi sigur Olaf Olsen, sum vísir á, at virksemi hjá teimum í dag hevur tilknýti til eina oljuvinnu eisini. Her sipar hann til framleiðsluna á Vónini, har hann er stjóri og nevndarformaður.

Har hava teir arbeitt við rigging av ymsum slag, og tað er eisini ein álvarsligur partur av tí, sum oljuvinnan hevur brúk fyri, stroppar og annað riggaraarbeiði til oljuvinnu, tá hon kemur í gongd.

Í dag umsitur Olaf Olsen teir 8 cubatrolararnar, sum í síni tíð vóru teir fyrstu føroysku bátarnir í oljuvinnuni, tá teir vórðu leigaðir út sum standbyskip í oljuvinnuni í Norðsjónum. Olaf Olsen sigur, at tað ber til at fáa cubatrolararnar lagdar um aftur til oljuvinnu, um so er at man fekk onnur skip at fiska ístaðin fyri.

Teir hava annars havt tveir av cubatrolarunum í oljuvinnuni herfyri og ætla teir at liggja framvið.

Olaf Olsen sigur, at tað hevði verið gott, um tað hevði borið til at brúkt teir gomlu cubabátarnar í oljuvinnuni og so fingið onnur nýggjari og betri skip at avloyst teir. -Hetta vita vit ikki enn, men vit royna at finna fram til, hvat skip kunnu kosta, sum kunnu avloys Cubatrolararnar. Hetta arbeiði er komið nakað ávegis og hava vit eina hylling á, hvar prísurin liggur, men soleiðis sum upsaprísur og oljuprísur er í dag, so er tað ikki nóg áhugavert.

Men skuldi tað hent, at upsaprísurin fer upp og oljuprísurin niður, so kundi hetta blivið spennandi. So útlit eru kanska til, at gomlu cubatrolararnir koma aftur til sína gomlu vinnu og harvið kundu verið brúktir í nøkur ár aftrat.


# Móttøka í Havnar Klubba

Í sambandi við, at
Anne Petersen hevur sín
síðsta arbeiðsdag eftir
44 árum, bjóðar
Føroya Bjór til móttøku fyri
viðskiftafólki og øðrum í
Havnar Klubba

**fríggjadagin 1. september**
**frá 16.00 til 20.00.**

Föroya Bjór
700 Klaksvík
Tel 45 54 54, Fax 45 60 52




# Fullan limaskap í týdningarmiklari nevnd

Á fundi í Norðurnevndini í Torneå í Finnlandi, varð eitt álit frá Norðurlendska Ráðharraráðnum lagt fram viðvíkjandi nevndini fyri Norðurlendska Mentanargrunnin.

Í grunninum hava sitið 11 limir; tveir fyri hvørt limalandið og síðani hevur ein limur sitið fyri tey trý sjálvstýrandi londini, ávikavist Áland, Grønland og Føroyar, sum sostatt hvør høvdu sítt umboð í grunninum triðja hvørt ár.

Broytingaruppskotið hevur við sær, at nevndin í Mentanargrunninum verður víðkað úr 11 til 13 limir. Sambært álitinum skulu Norðurlandaráðið og Ráðharraráðið velja hvør sínar fimm limir úr limalondunum. Samsvarandi hesum verður tiltakslimur valdur fyri hvønn limin. Á líknandi hátt verða tríggir limir valdir fyri ávikavist Føroyar, Grønland og Áland. Føroyska umboðið saman við tiltaksliminum verða vald annaðhvørt ár av Norðurlandaráðnum og annaðhvørt ár av Ráðharraráðnum. Grønland og Áland hava fingið eina líknandi skipan.

Henda broyting hevur við sær, at Føroyar nú fáa 1 fastan limasess í nevndina fyri Norðurlendska Mentanargrunnin, meðan tey fimm størru londini framhaldandi varðveita sínar tveir limir.

Málið varð reist í síni tíð av Harriet Andersson av Álandsoyggjunum, Lise Lenerth úr Grønlandi og Signari á Brúnni úr Føroyum. Jóannes Dalsgaard hevur sitið sum føroyskur limur triða hvørt ár, og hann hevur virkað fyri málinum hvørja ferð umstøður hava verið til tess.

Føroysku limirnir í Norðurnevndini hjá Norðurlandaráðnum eru Jógvan við Keldu, sum er í bólki við teimum konservativu, og Dan R. Petersen, sum situr í javnaðarbólkinum. Tað hevur havt serliga stóran týdning fyri gongdina í málinum, at føroysku umboðini hava havt høvi til at gera ávirkan sína galdandi í politisku bólkum sínum. Í dag taka norðurlendsku mentamálaráðharrarnir, samstarvsráðharrarnir og eisini limirnir í sjálvum Mentanargrunninum undir við broytingaruppskotinum.

Um alt gongur eftir ætlan verður álitið góðtikið av Norðurnevndini á fundi í september mánaði. Síðani skal Ráðharraráðið leggja uppskotið fram á ársfundinum hjá Norður-landaráðnum, sum verður í Reykjavík í november, og verður endaliga avgerðin tikin har.

Formaðurin í Norðurlendska Mentanargrunninum, danski fólkatingslimurin Søren Hansen (Jvf.), segði um hetta aftaná fundin í Torneå, at ”Tit kunnu nú fara glaðir heim, tí hetta er ein stórur sigur fyri Føroyar.”

Norðurlendski Mentanargrunnurin hevur 25 mió. kr. at býta út árliga. Útbýtingin fer fram tann 15. mars og tann 15. september. Seinastu trý árini hava føroyskar umsóknir verið játtaðar góðar 350.000 kr. í miðal. Hetta svarar til 103.000 kr. í miðal til hvørja av teimum tilsamans 22 umsóknunum úr Føroyum hesi árini.

Umframt málið um Norðurlendska Mentanargrunnin viðgjørdi Norðurnevndin eisini evnini ”Útjaðari og Økissamstørv”, ”Bardagi móti narkotika - og narkotika, ein hóttan móti demokratinum”. Eisini varð skipað fyri áhugaverdari ráðstevnu undir heitinum ”Samstørv yvir landamørk í Norðurlondum”.

Av og á er eisini uppi at venda, at Noreg og Danmark venda sær meira til útnorðurlondini, meðan Svøríki og Finnland hava góð samstørv við eystursjóvarlondini, eitt nú baltisku londini. Í hesum sambandi varð gjørt vart við, at fløggini hjá smáu sjálvstýrandi londunum ikki vóru at síggja á fundinum.

# Fundur um geiðsladálking

Mánadagin høvdu útlendskir og føroyskir granskarar ein fund á Náttúru-vísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Fundurin var ein liður í einari felags granskingarætlan, ið hevur til endamáls at kanna geiðslavirka dálking í londunum kring okkum.



Viðmerking:

# Álvaratos - nú fóru tit ov langt

*Landsstýrið vendir sær til ST*



Eg veit ikki, hvussu ofta eg havi heitt á landsstýrið um at saðla um í spurninginum um framtíðarstøðu Føroya. Men nú eru vit komin hartil, at tað saðlast ikki umaftur, tí landsstýrið hevur fullkomiliga mist tamarhaldið á fullveldishestinum, sum nú galoperar uttan mið ella mál.

Seinasta bragdið hjá landsstýrinum var so hendingin í gjár, tá tað kom fram, at menn í fullum álvara hava sent Sameindu Tjóðum bræv, har teir kæra sína neyð um eina tvøra og illviljaða danska stjórn. Hetta má av røttum sigast vera at bíta høvdið av allari skomm, um nøkur skomm ella nakað høvd eru eftir.

Eftir politisku boðum frá einum einaráðandi varaløgmanni og við einum løgmanni í tíð hevur løgmansskrivstovan skrivað ST bræv, har greitt verður frá samráðingunum millum Føroyar og Danmark um skipan av Føroyum sum fullveldi.

Og alt fer fram í duldum, tí hvørki Løgting ella Uttanlandsnevnd er kunnað um hetta skýmaspæl.

M.a. verður nevnt í hesum brævi, at hóast landsstýrið hevur gjørt drúgvt fyrireikingararbeiði, so hevur danska stjórnin ikki veruliga víst vilja til at samráðast. Hetta má veruliga sigast at vera ein politisk viðmerking, so tað stendur eftir, og sum neyvan nakar embætismaður við virðing fyri sær sjálvum og sínum fakliga førleika av sínum eintingum skrivar. Og varaløgmaður viðgongur eisini, at hann alfaðirliga hevur góðkent orðingina, men hevur tó ikki dirvi til sjálvur at seta sítt navn undir brævið, men letur embætismannin standa einsamallan. Løgmaður raknar tó so mikið við, at hann viðgongur, at hann er vitandi um skrivið.

Men so roynir hann at bera í bøtuflaka fyri varaløgmann við at siga, at hetta er alt á embætisstigi og als ikki politiskt. Men hetta er beinleiðis skeivt, tí er tað almenna Føroyar, sum hevur sent brævið, og partar av innihaldinum eru sanniliga eisini politiskir.

### Hvat hugsa hesir menninir fyri sær?

Hvat hugsa hesir menninir fyri sær? Teir seta seg í samband við ST um eina samráðing, har danska stjórnin ferð eftir ferð hevur sagt, at vilja tit hava fullveldið, so seta teir seg ikki ímóti. Men teir fíggja so ikki loysingina longur enn tey fýra árini.

Trupulleikin við øllum hesum hurlivasa er stutt sagt tann, at landsstýrið torir ikki at taka av tí, teir hava biðið um. Teir hava biðið um loysing - teir fáa loysingina - men teir tora ikki at taka av, tí allar fortreytirnar, sum teir hava brúkt almenna tíð og almenna pengar til at billa Føroya fólki inn fóru at halda, tær halda ikki. Teir hava júkað um, at loysingin fór ongar avleiðingar at fáa fíggjarliga, og at okkara rættindir og møguleikar fóru at verða skerdir, men hetta heldur ikki.

Hvat er so til ráðar at taka? Í staðin sum menn at farið út og sagt við Føroya fólk, at hetta var tað, hvat siga tit nú, so verður nú roynt at billa altjóða samfelagnum inn, at støðan millum londini er so spent, at ST má spyrjast til ráðs.

### Plan B

Plan B hjá Tjóðveldisflokkinum er, at nú skal onkur annar hava skuldina av einum miseydnaðum sandkassaprojekti, sum vøkru orðini í Hvítubók ikki megnaðu at bera í hús. So í staðin fyri at taka í egnan barm, so er Plan B at geva onkrum øðrum skyldina, og tað vil man hava ST at hjálpa sær við. Fólkaflokkurin hevur eftir øllum at døma hvørki ein Plan A ella ein Plan B.

Gud viti, hvat teir siga har yviri í New York til hetta bræv? Teir, sum vanliga handfara trupulleikar og sorgarleikir í m.a. fyrrverandi Jugoslavia, Eritrea ella Eystur-Timor. Millum sorgarleikir um kúgan, massakrir og étniska týning, skulu teir nú til at viðgera trupulleikarnir millum Føroyar og Danmark. Ella hvat høvdu somu menn sagt, um teir komu henda vegin og sóu, hvussu støðan er í Føroyum. Her eru so ongar landminur og hópgravir, sum er partur av teirra gerandisdegi. So eitt friðarvarðveitandi herlið hevði fingið góðar dagar í hesum máli.

### Panikkur á monnum

Her er eingin ivi um, at panikkur og desperatión er á monnum. Teir royna nú av øllum alvi at snara okkara eygum frá teirra egnu ómegd og so at fáa sett ein so álvarsligan kíla imillum Føroyar og Danmar, at skaðin ikki verður bøttur. Eitt er hvat danska stjórnin heldur um hetta seinasta stigið hjá Høgna Hoydal og Anfinni Kallsberg, tað er kanska ikki so týdningarmikið, men verri er, hvussu vit føroyingar og serliga okkara landsmenn í Danmark nú verða uppfataðir av vanligum dønum.

Er tað nakað, sum eingin brýggjar seg um, so er tað at verða stevndur inn fyri ST fyri valdsmisbrúk, kúgan o.l.

Eg má bert stutt staðfesta, at nú hava tit mist tamarhaldið á støðuni. Tað, sum nú fer fram er til óbótaligan skaða fyri land og fólk. Vælsignaðir menn stingið í sekkin, áðrenn tit gera fleir vanlukkur og seta alt okkara yvir stýr.

Tit hava so við hesum seinasta desperata tiltaki prógvað, at tit eru ikki uppgávuna vaksnir.

**Jóannes Eidesgaard**





# Vit flyta

## - men bert yvir um vegin

Frá mánadegnum 28. august 2000 flyta vit deildina í Hornabø yvir um vegin til J. C. Svaboesgøta 56. Samstundis verður sjálvtøkan flutt og sett upp í horninum, har deildin nú kemur at halda til.

*Vælkomin í nýggju deildina í Hornabø...*

FØROYA BANKI

petur & petur • 320870